# Gourmet letur upp í dag

**Nýggja matstovan Gourmet hjá Leif Sørensen, kokki, letur upp í dag. Matstovan liggur frálíka væl fyri við útsýni yvir Vestaru Vág**

MATSTOVA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Snotiliga matstovan Gourmet við útsýni yvir Vestaru Vág letur upp í dag.*

*Mynd: Jan Müller*

Fólk hava við spenningi bíðað eftir, at nýggja matstovan Gourmet hjá navnframa kokkinum Leif Sørensen fór at lata upp beint hinumegin Smiðjuna í Lítluvík, og nú er tann dagurin so komin, at latið verður upp fyri almenninginum.

## Trupult at fáa fisk

Leif Sørensen sigur, at tað hevur verið ein ávísur áhugi fyri matstovuni hesa seinastu tíðina, og longu nú eru teir báðir fyrstu dagarnir, ið opið er, at kalla fult upptikið á matstovuni. Áhugin fyri hølunum hevur eisini verið sera stórur, og nógv fólk hava hugt inn, tá ið tey hava lagt leiðina framvið.

Spurdur hvussu tað gongur við at fáa tær røttu rávørurnar, sigur Leif Sørensen, at tað kann verða eitt sindur trupult. Fleiri av rávørunum, ið Leif nýtur, bíleggur hann sjálvur úr útlandinum, tí tær fáast ikki í vanligu matvøruhandlunum.

- So løgið tað ljóðar kann tað eisini verða trupult at fáa fatur á fiski. Her í Havn ber næstan altíð til at fáa fatur á upsa og havtasku, men tað kann verða eitt sindur trupult at fáa fatur á toski. Í morgun(hósmorgunin) keypti eg sjálvur tosk á bryggjuni í Vágsbotni, men eg vóni, at fólk fara sjálvi at bjóða rávørur fram til matstovuna at keypa, sigur Leif Sørensen.

Í sambandi við at Gourmet letur upp, verður móttøka millum klokkan trý og fimm í dag, og um hálvgum sjey letur matstovan upp fyri almenninginum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av útsynningi og suðri, turt og sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin av landsynningi og regn. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi. Mánadagin ælingur, men týsdagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 15 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 15 |
| Tromsø | 17 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 26 |
| Athen | -- |
| Malta | 24 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 40 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 18 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1003 hPa. við Føroyar fer í útnyrðing norðan og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 988 hPa. á 51N-34V fer í landnyrðing og grynnist. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjakvøldið.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer í landnyrðing og verður við Føroyar leygarnáttina. Hátrýstið yvir Ermasundi fer spakuliga í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/6 kl. 06⁰⁰– 16/6. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,9°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 15/6 kl. 06⁰⁰– 16/6 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 16,4 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 11. juni | Mánin longst frá jørðini |
| 15. juni | Fyrra kvarter |
| 22. juni | Fullmáni |
| 23. juni | Mánin næst jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. Juni | 03.24 | 15.43 | 02.24 | 14.43 | 02.39 | 14.58 | 05.24 | 17.43 | 06.24 | 18.43 | 01.39 | 13.58 | 00.39 | 12.58 | 03.39 | 15.58 | 04.39 | 16.58 | 03.09 | 15.28 | 04.24 | 16.43 |
| 18. Juni | 04.03 | 16.24 | 03.03 | 15.24 | 03.18 | 15.39 | 06.03 | 18.24 | 07.03 | 19.24 | 02.18 | 14.39 | 01.18 | 13.39 | 04.18 | 16.39 | 05.18 | 17.39 | 03.48 | 16.09 | 05.03 | 17.24 |
| 19. Juni | 04.46 | 17.10 | 03.46 | 16.10 | 04.01 | 16.25 | 06.46 | 19.10 | 07.46 | 20.10 | 03.01 | 15.25 | 02.01 | 14.25 | 05.01 | 17.25 | 06.01 | 18.25 | 04.31 | 16.55 | 05.46 | 18.10 |
| 20. Juni | 05.34 | 17.58 | 04.34 | 16.58 | 04.49 | 17.13 | 07.34 | 19.58 | 08.34 | 20.58 | 03.49 | 16.13 | 02.49 | 15.13 | 05.49 | 18.13 | 06.49 | 19.13 | 05.19 | 17.43 | 06.34 | 18.58 |
| 21. Juni | 06.22 | 18.52 | 05.22 | 17.52 | 05.37 | 18.07 | 08.22 | 20.52 | 09.22 | 21.52 | 04.37 | 17.07 | 03.37 | 16.07 | 06.37 | 19.07 | 07.37 | 20.07 | 06.07 | 18.37 | 07.22 | 19.52 |

Sosialurin
5 707265 100050 >